**Váttan sambært sáttmálanum um setanarviðurskifti sjófólksins (MLC), Norm A 2.5.2., um løgtingslóg um Trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.**

Endamálið við Trygdargrunninum er at tryggja løntakarum lønarágóða, um staðfest er, at arbeiðsgevari ikki kann rinda. Staðfest skal vera, at arbeiðsgevari er farin konkurs, ella at fyritøka er hildin uppat, og arbeiðsgevari ikki er førur fyri at gjalda lønarkrøvini.

Trygdargrunnurin kann rinda lønarkrøv, sum eru vunnin seinastu 90 dagarnar fyri freistdagin, tó í mesta lagi 60.000 kr. Grunnurin kann eisini rinda frítíðarløn, sum er vunnin seinastu 6 mánaðirnar fyri freistdagin. Grunnurin rindar ikki fyri uppsagnarløn.

Allir arbeiðstakarar í Føroyum eru umfataðir av Trygdargrunninum.

Umsókn um lønarágóða skal vera móttikin í seinasta lagi fýra vikur eftir freistdagin, annars verður umsóknin ikki viðgjørd. Tað er lønmóttakarin sjálvur, ið skal søkja Trygdargrunnin um lønarágóða.

Umsóknarblað við vegleiðing finst á taks.fo > oyðubløð > trygdargrunnurin. Saman við umsóknini skal viðleggjast prógv fyri lønarkravinum, eitt nú tímaseðlar, lønarseðlar e.tíl.

Ásetingar um Trygdargrunnin eru at finna í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um Trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

Skálatrøð 20
Postrúm 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo